# Vágbingar sinnaðir at líta frameftir

**Vágs Býráð hevur einmælt samtykt at samráðast við Landsstýrið og hinar kommunurnar í Suðuroy um at byggja røktarheim í Vági. Men treytir fylgja við**

RØKTARHEIM Í VÁGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú skal tilboðið frá landsstýrinum til vágbingar, og suðuroyingar sum heild, um lagaliga fígging til eitt røktharheim standa sína roynd. Soleiðis kann eitt røktarheim vesturi á Vatninum í Vági, fara at síggja út*

Nú skal tilboðið frá Landsstýrinum til Vágbingar, og suðuroyingar, sum heild, standa sína roynd.

Landsstýrið hevur bjóðað suðuroyingum lagaliga fígging til eitt røktarheim í Vági afturfyri, at miðnámsskúlin varð fluttur til Hovs.

Og nú hava bæði Vágs Býráð og bygdaráðið í Porkeri einmælt samtykt at taka av tilboðnum.

Sostatt hava báðar kommunurnar samtykt at fara undir samráðingar við landsstýrið og hinar kommunurnar í Suðuroynni um at byggjarøktarheim í Vági.

Tað hevur ligið í kortunum, at landsstýrið vil hava at røktarheimið verður bygt á stykkinum vesturi á Vatninum, sum annars er grivið út til miðnámsskúlan.

Men Vágs Býráð vil ikki binda staðbinda røktarheimið enn, tí tað hava eisini verið røddir frammi í býráðnum um at røktarheimið skal byggjast á Marknoyri, har kommunan hevur sett øki av til eldrarøkt.

Í sínari samtykt læt Vágs Býráð sostatt tí týðiliga vera við at nevna, hvar í býnum, røktarheimið skal byggjast.

Sostatt hevur Vágs Kommuna einans samtykt at samráðast um at byggja røktarheim í Vági, men ikki, hvar í Vági tað skal vera.

### Sinnisveik og minnisveik uppí

Men samtyktin hjá Vágs Býráð er ikki treytaleys. Býráðið samtykti nevniliga eisini, at pláss til sinnisveik og pláss til minnisveik skulu vera við í ætlanini.

– Hetta var ein heildarætlan, sum landsstýrið legði fram á fundi við kommunurnar í Øravík fyrr í vár og hetta vil Vágs Kommuna halda seg til.

Hinvegin hevur bygdaráðið í Porkeri samtykt at taka upp samráðingar um at byggja røktarheim á stykkinum í Vági, sum varð grivið út til miðnámsskúlan.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági er sera væl nøgd við, at býráðið einmælt hevur samtykt at samskifta við landsstyrið og hinar kommunurnar um at byggja røktarheim í Vági, heldur enn at vísa málið frá sær, soleiðis sum meirilutin hevur gjørt higartil.

Nógv mál kunnu loysast við at tosa og samskifta um viðurskiftini, heldur hon.

– Nú fáa vit so loksins at síggja, hvat veruliga býr undir tilboðnum frá landsstýrinum um lagaliga fígging.

Landsstýrið metir, at eitt heim til 38 fólk kostar 38 milliónir og fer at geva 49 heildagsstørv. Vanliga gongur 1,6 starvsfólk til hvørt heildagsstarv, tí so nógv arbeiða niðursetta tíð og sostatt fer eitt slíkt heim at krevja 78 starvsfólk, umfram fólk til bókhald, roknskap og annað.

Hinvegin verður mett, at eitt heim til 30 fólk fer at kosta 30 milliónir og tað fer at geva 39 ársverk, ella 62 starvsfólk.

Landið betalir helvtina av byggikostnaðinum, ella í mesta lagi 500.000 krónur fyri hvørt búfólk.

# Ikki fegin um at fáa revolvaran fyri pannuna

**Borgarstjórin í Vági er ikki fegin um at kommunusamanleggi ng verður sett sum treyt fyri at byggja røktarheim í Vági**

RØKTARHEIM OG SAMANLEGGING
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Spurningurin um at leggja kommunur í Suðuroy saman, eigur ikki at tenngjast saman við málinum um at byggja røktarheim í Vági, heldur Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági*

– Mær dámar illa at málið um kommunusamanlegging í Suðuroy og málið um at byggja røktarheim í Vági, eru tengd saman.

Borgarstjórin í Vági følir tað sum um hon hevur fingið revolvaran fyri pannuna, nú kommunurnar skulu samráðast um at byggja røktarheim í Vági.

Bórgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, hevur í útvarpinum boðað frá, at Tvøroyrar Býráð fer neyvan at samráðast um at byggja røktarheim í Vági uttan at kommunurnar í Suðuro eisini eru sinnaðar til at samráðast um at leggja saman.

– At samráðast undir slíkum treytum hóvar mær sera illa, tí eg haldi, at tað er skeivt at tengja málini saman. Og eg haldi ikki at tað er rætt at hótta hinar kommunurnar í oynni á hendan hátt, sigur Kirstin Strøm Bech.

– Men nú fáa vit at síggja, hvussu samráðingarnar verða, leggur hon afturat.

Kortini ásannar hon, at spurningurin um at leggja kommunur í Suðuroy saman, er eitt mál, sum bý- og bygdaráðini í oynni koma at taka støðu til í næstu framtíð.

– Skulu kommunurnar leggja saman, mugu vit eisini gera okkum greitt, at vit vilja arbeiða fyri at menna alla oynna og ikki bara ávís pláss.

– Hetta er ein spurningur, sum eisini Vágs Býráð kemur at taka støðu til í næstum, sigur hon.

Men hon er sannførd um, at áðrenn býráðið fer undir eina samanlegging, má tað fáa heimild til tað frá fólkinum á eini fólkaatkvøðu.

Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porkeri, hevur áður nevnt møguleikan at gera eina óhefta, fakliga kanning um, hvørjir fyrimunir og vansar eru við eini kommunusamanlegging í Suðuroy og tað er eitt uppskot, sum Kirstin Strøm Bech heldur ljóðar skilagott.

– Kommunusamanlegging er nýtt fyribrigdi í Føroyum og tað kundi eisini verið hent hjá suðuroyingum at frætt, hvørjar royndir tey á Skálafirði og tey í Sunda Kommunu hava gjørt sær av samanleggingini, bæði at góðum og ringum, heldur borgarstjórin í Vági.

## Skal kanna peninganýtslu hjá tveimum landsstýrismonnum

**Landsstýrismálanevndin hevur biðið landsgrannskoðaran kanna, hvussu Hans Pauli Strøm og Jógvan á Lakjuni hava goldið ymsar rokningar í sambandi við røktarheim í Vági og skúladepil í Hovi**

EMBÆTISFØRSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsgrannskoðarin skal nú kanna hvussu Hans Pauli Strøm og Jógvan á Lakjuni hava goldið ymsar útreiðslur í sambandi við ætlanina at byggja skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági.

Tað er landsstýrismálanevndin, sum hevur heitt á landsgrannskoðaran um at gera hesar kanningar.

Landsstýrið hevur gjørt ymsar kanningar, umframt at tað hevur hildið fundir og havt framløgur av ymsum slagi, síðani tað fór at arbeiða við ætlanini um at flyta ætlaða miðnámsskúlan í Vági í ein skúladepil í Hovi saman við heilsuskúlanum á Tvøroyri og at byggja røktarheim í Vági afturfyri.

Og landsstýrismálanevndin vil nú hava landsgrannskoðaran at kanna, hvaðani Hans Pauli Strøm og Jógvan á Lakjuni hava fingið pening til hesar útreiðslurnar.